# Húsaprísurin hækkar í Bretlandi



Húsaprísirnir í Bretlandi eru hækkaðir hendan mánaðin, og tað er triðja mánað á rað, at prísirnir hækka, segði realkreditfelagið Nationwide Building Society í einari fráboðan í morgun. Hækkingin í juli var 1,3 prosent. Realkreditfelagið, sum er eitt av teimum stóru í Bretlandi, sigur, at gongdin teir seinastu mánaðirnar vísir, at marknaðurin er við at finna eina trygga og støðuga legu. Martin Gahbauer, sum er búskaparfrøðingur hjá Nationwide Building Society, sigur í fráboðanini, at gtongdin hevur verið nógv meiri jalig, enn felagið hevði roknað við.

# Influensa A kann herja skúlarnar

Tann 10. august byrja teir donsku skúlarnir aftur aftan á summarfrítíðina, og læknar og onnur stúra nú fyri, at dagurin kann gerast byrjanin til, at Influensa A fer at gera um seg av álvara. Lars Østergaard, sum er professari á smittudeildini á Skejby-sjúkrahúsinum í Århus, sigur við DR-kringvarpið, at tá børnini koma aftur í skúla, koma tey nógv tættari hvør øðrum enn í summarfrítíðini, og tað ger smittuvandan so mikið størri. Avleiðingarnar fara væntandi at vísa seg um einar tríggjar ella fýra vikur, sigur Lars Østergaard við DR. Eins og aðrir serfrøðingar vísir hann á, at tað eru serliga fólk á ungum aldri, sum fáa Influensa A ella svínakrím.

# Foreldur og børn fegnast um Skálatrøð

**At savna meginpartin av spæliplássunum á Skálatrøð var ein brakandi succés – hjá bæði børnum og foreldrum**

ÓLAVSØKA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var farvæl til ein fastan part av ólavsøkuni, tá Tórshavnar Kommuna tók avgerð um, at Kommunuskúlagarðurin ikki var partur av ólavsøkuskránni í ár.

Skjótitelt, candyfloss-básar og karusellir vórðu flutt úr Kommunuskúlagarðinum, Vaglinum og Steinatúni, og varð hetta ístaðin savnað á parkeringsøkinum á Skálatrøð.

Og har var av sonnu futtur í. Alla ólavsøkuna var stúgvandi fult av børnum, sum hugnaðu sær í hoppiborgum, el-bilum og básum av ymsum slag, meðan foreldrini í friði á náðum kundu stytta sær stundir við práti, poppcorni og annars hugsa um, hvussu bílig ólavsøkan er blivin.

Tí umframt fysisku flytingina av stuttleikaøkinum, var ólavsøkan í ár eisini sermerkt av, at stuttleikin hesa ferð varð tikin fram um profitt-maskinuna, sum annars hevur verið eitt støðugt irritatiónsmoment fyri mong foreldur.

Høgl til byrsurnar og seðlar til 21-spæl og tombola skulu framvegis gjaldast. Men restin av undirhaldanum var ókeypis til børnini, og tað mundu hjá teimum flestu kennast sum ein stór føðingardagsgáva frá 100-ára føðingardagsbarninum.

Í øllum førum man tað vera langt síðani, at ein ólavsøkuaftan í Miðbýnum kann haldast fyri samanlagt 210 krónur hjá eini familju við trimum børnum. Men tað var útreiðslutotalurin hjá yvirritaða – í øllum førum um dagin.



*Fyri foreldrini mundi tað kennast sum ein lætti, at børnini kundu njóta stóran part av undirhaldinum, uttan at leitast skuldi alt ov djúpt í lummarnar*

*Mynd: Beinta Haraldsen*



*Børn og føroysk klæði hoyra eisini ólavsøkuni til*

*Mynd: Beinta Haraldsen*



*Hoppiborgirnar eru avgjørt komnar fyri at vera. Og største partin av ólavsøkuni vóru hesar fullar av størri og minni børnum*

*Mynd: Beinta Haraldsen*



*Skjótibreytirnar vórðu eisini væl vitjaðar, hóast tær nú eru at finna á Skálatrøð*

*Mynd: Beinta Haraldsen*